# Hjartaliga tillukku við FM-heitinum 2007



FAROE SHIP LITAVAL REYNI SERVICE

REPROZ



Á Økisdeildini í Tórshavn arbeiða 15 fólk. Økið hjá deildini er Streymoy, Vágar, Nólsoy, Hestur, Skúvoy og Sandur. Starvið kann innibera ferðing.

## Almannastovan søkir sosialráðgevar til Økisdeildina í Havn

Á Økisdeildini í Havn, Tinghúsvegur 14, eru 2 størv leys til setan skjótast tilber.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er**

- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa áheitanum til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni.

**Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av, eru**

- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir uppihaldshjálp og stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensiónir.

**Førleikakrøv**

- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt.

**Vit kunnu bjóða**

Eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

**Nærri upplýsingar**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, tel 35 35 70.

**Umsóknir**

Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin**

Freistin at søkja er mánadagin 16. apríl 2007 kl. 12.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO TEL 47 80 80